## Verður helst Capello

Alt tykist nú benda á, at Fabio Capello verður nýggjur enskur landsliðsvenjari. Enskir miðlar skriva, at tað nú bert er ein spurningur um tímar, áðrenn 61 ára gamli italiumaðurin fær sáttmála sum landsliðsvenjari. Capello var á fundi við enska fótbóltssambandið í gjár, og nú sigst, at einasti formaliteturin, sum restar, er góðkenning frá nevndini hjá sambandinum. Brian Barwick og Trevor Brooking, sum vegna FA samráddust við Capello, staðfesta í øllum førum, at samráðingarnar gingu serstakliga væl.



## Tryggur StÍF-sigur

Strandinga, sum fýra ferðir á rað hava vunnið steypakappingina í manshondbólti, vunnu seg í gjárkvøldið fram til hálvfinaluna í ársins útgávu av Coca-Cola-kappingini. Teir spældu móti KÍF, og tann dystin vann StÍF við sannførandi 37-25. Støðan í hálvleikinum var 22-10. David Edvardsen var besti málskjúttin hjá StÍF við 9 málum. Fyri KÍF skeyt Damir Oros 7 mál.

# Vónbrot hjá Rangers

**Glasgow Rangers skuldi bert fáa eitt stig, fyri at tryggja sær víðari luttøku, men hetta eydnaðist ikki. Aðrastaðni fingu ungu United dreingirnar javnleik í Roma, har harðskapur millum fjepparar hjá liðunum merkti dystin**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Glasgow Rangers megnaði ikki at standa ímóti trýstinum. Tá síðsta bríksl ljóðaði, stóð máltalvan á 3-0 til gestirnar, og teir hjá Rangers vóru tá bert tíggju á vøllinum.

Í Roma var dystur millum Roma og Manchester United. Sir Alex Ferguson hevði valt at byrja við Wayne Rooney og Louis Saha, men annars nærum bert við ungum leikarum móti einum Roma liði, ið eisini nýtti sama taktikk. Dysturin varð av tí sama nakað javnur í byrjanini, og tá ungi Gerard Pigue skoraði fyri United, byrjaði heimaliðið at taka meira og meira yvir í dystinum. Og eftir at hava rakt tvørtræið tvær ferðir hendi tað, sum mátti henda. Roma javnaði við máli frá brasiliumanninum Mancini.

Tað, sum merkti dystin meira enn fótbólturin, var tað, sum hendi undan dystarbyrjan. Stórur bardagi var millum viðhaldsfólk hjá Roma og tey hjá United, og endin varð, at sjey ensk viðhaldsfólk vórðu innløgd á sjúkrahús í italska høvuðstaðnum.

Arsenal vann sín dyst í kvøld, men lítið nyttaði, tí Sevilla vann eisini sín dyst. Sostatt megnaði Arsenal ikki at røkka fyrsta plássinum í bólkinum, men víðari komu teir so.



*Siendy Govou sendi bóltin inn um Allan McGregor, og so stóð 1-0 til gestirnar úr Lyon. Tað legði eyka trýst á Ragners, og tá teir satsaðu móti dystarenda gekk heilt galið*

*Mynd: Polfoto/AP*

### FAKTA

**Úrslitini mikukvøldið**

| | |
|---|---|
| Barcelona-Stuttgart | 3-1 |
| Rangers-Lyon | 0-3 |
| Roma-Man Utd. | 1-1 |
| Sporting-Dynamo Kiev | 3-0 |
| Fenerbache-CSKA Moskva | 3-1 |
| PSV Eindhoven-Inter | 0-1 |
| Arsenal-Steaua B. | 2-1 |
| Slavia Prag-Sevilla | 0-3 |

| Endaligu støðurnar | mál- | |
|---|---|---|
| **Bólkur A:** | **munur** | **Stig** |
| 1 Porto | 1 | 11 |
| 2 Liverpool | 13 | 10 |
| 3 Marseille | -3 | 7 |
| 4 Besiktas | -11 | 6 |
| **Bólkur B:** | | |
| 1 Chelsea | 7 | 12 |
| 2 Schalke 04 | 1 | 8 |
| 2 Rosenborg | -4 | 7 |
| 4 Valencia | -4 | 5 |
| **Bólkur C:** | | |
| 1 R.Madrid | 4 | 11 |
| 2 Olympiakos | 3 | 11 |
| 3 W.Bremen | -4 | 6 |
| 4 Lazio | -3 | 5 |
| **Bólkur D:** | | |
| 1 Milan | 6 | 13 |
| 2 Celtic | -5 | 9 |
| 3 Benfica | -1 | 7 |
| 4 Shakhtar | -5 | 6 |
| **Bólkur E:** | | |
| 1 Barcelona | 9 | 14 |
| 2 Lyon | 1 | 10 |
| 3 Rangers | -2 | 7 |
| 4 Stuttgart | -8 | 3 |
| **Bólkur F:** | | |
| 1 Man Utd | 9 | 16 |
| 2 Roma | 5 | 11 |
| 3 Sporting | 1 | 7 |
| 4 D.Kiev | -15 | 0 |
| **Bólkur G:** | | |
| 1 Inter | 8 | 15 |
| 2 Fenerbahce | 2 | 11 |
| 3 PSV | -3 | 7 |
| 4 CSKA | -7 | 1 |
| **Bólkur H:** | | |
| 1 Sevilla | 7 | 15 |
| 2 Arsenal | 10 | 13 |
| 3 Sl. Prague | -11 | 5 |
| 4 St.Bucaresti | -6 | 1 |

# Vilja flyta afrikanska meistaraheitið

**Hjálparvenjarin hjá Portsmouth heldur, at er ein stórur vansi fyri hansara lið, at Africa Nations Cup er í januar og februar**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heri@sosialurin.fo*

Fótbóltsglaðir afrikanar gleða seg. Í døgunum frá 20. januar til 10. februar 2008, verður Africa Nations Cup - afrikanska meistaraskapið - í fótbólti. Ghana verður vertstjóð hesuferð. Afrikanska meistaraskapið verður hildið annað hvørt ár. Hjálparvenjarin hjá Portsmouth er ikki so glaður fyri tíðarásetingina. Joe Jordan vísir á, at Portsmouth missir fimm leikarar úr hópinum, og at tað kemur illa við hjá Pompey. Fyrrverandi Chelsea-leikarin Gavin Peacock er ósamdur: "Tá feløgini skriva sáttmála við ein afrikanskan leikara, so vita teir væl og virðiliga, at annað hvørt ár fer hesin avstað í januar mánað at umboða land sítt í Africa Nations Cup." Joe Jordan heldur, at kappingin burdi verið í Juni. Men Gavin Peacock sigur: "Afrikanar høvdu fyri langari tíð síðani lagt kappingina í juni, um tað var grundarlag fyri tí! Tað er uppgávan hjá afrikonsku fótbóltssamgonguni at menna afrikanskan fótbólt, og ikki evropeiskan." Chelsea missir fýra leikarar til afrikanska meistaraskapið. Har ímillum Didier Drogba. 79% av leikarunum, sum skulu leika í Africa Nations Cup, eru yrkisleikarar í Evropa.